# Fimleikur á Hálsi

FM-kapping og B-kapping í estetiskum fimleiki verður í Ítróttarhøllini á Hálsi um vikuskiftið. Leygardagin verða B-kappingarnar fyri pinkur og gentur, meðan FM-kapping verðru fyri pinkur, gentur og kvinnur. Sunnudagin verða tvær FM-kappingarnar, og eru hesar fyri smágentur og unglingar. Kappingarnar leygardagin byrja klokkan 13.30, og sunnudagin verður byrjað klokkan 16.



# 100.000 vilja hyggja

Atgongumerkjakvotan, sum Manchester United hevur fingið til Champions League-finaluna í Moskva er upp á 21.000 atgongumerki. Men hóast hetta ljóðar av nógvum, so er hetta als ikki nóg mikið til tørvin. – Vit kundu sum einki selt fleiri enn 100.000 atgongumerki til handan dystin, so talan verður um nógvar vónbrotnar fjepparar, sigur stjórin í Manchester United, David Gill, við Sporting Life.

# Kapprenna við tíðina

**Hjá fleiri av teimum seks, sum skulu í eldin sunnudagin, eru spælarar ivasamir, og nú verður kapprunnið við tíðina fyri at pjøssa um spælararnar**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Higartil hevur B68 eins og KÍ runnið aftaná. Mikukvøldið broyttist hetta, og sunnudagin er setningurin hjá báðum pørtum at koma heilt frá strikuni*

*Savnsmynd: Jens Kr. Vang*

Tríggir dystir í Formula deildini eru á skránni sunnudagin. Teir eru ÍF-B71, B68-KÍ og B36-Skála. Hinir báðir verða spældir í næstuviku: NSÍ-EB/Streymur mánakvøldið og Víkingur-HB týskvøldið.

Tá ið tað er so stutt millum uppgerðirnar, sum tað hevur verið í hesi vikuni, er lítil tíð til rættiligar venjingar. Í gjár hittust spælararnir í fleiri av liðunum, og teir fara aftur at hittast í kvøld. Tað snýr seg um at loysa troyttu vøddarnar, at venja eitt sindur týdningarmiklu deyðbóltsstøðurnar og kanska eitt sindur av taktiskari venjing.

Tey, sum hava mest at gera í hesum døgum, eru fysioterapeutarnir, sum í kapprenning við tíðina arbeiða við at pjøssa um teir spælararnar, sum mikukvøldið fingu snuddir, og sum venjararnir fegnir vilja hava at spæla sunnudagin.

ÍF hevur havt leikligan undanvind, men úrslitini hava ikki svarað til spælið. Mikukvøldið sektaðu fulgfirðingar seg sjálvar, tá ið fyrst Alexander Jovevic varð rikin av vølli fyri tvey gul kort, og tá ið Balasz Sinko síðani varð rikin av vølli fyri at mótmæla. Hvørgin teirra verður við ímóti sandoyingum.

Hjá B71 var tað stórur smeitur, at Gudmund Nielsen longu eftir hálvan tíma noyddist at fara av vøllinum í Klaksvík. Á Sandi vóna teir, at síðuspælarin í høgru verður tøkur sunnudagin, men tað ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla.

Bæði á Toftum og í Klaksvík er lagið gott eftir at tað mikukvøldið eydnaðist liðunum at vinna fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum. Prísurin fyri sigurin hjá toftamonnum á Skála var, at Ameth Keita og Kristian Anton Andreasen noyddust skaddir av vøllinum. Jacob Bymar var so mikið skaddur, at tað ikki bar honum til at spæla mikudagin. Í B68 verður vónað, at bæði Kristian Anton Andreasen og Ameth Keita verða førir fyri at spæla ímóti KÍ.

Hjá KÍ noyddist Ovi Nysted at fara av vøllinum mikukvøldið, tí hann hevur skaða í lærkrikanum at dragast við. Tað er ikki serliga sannlíkt, at hann verður førur fyri at spæla sunnudagin.

Hjá Skála var Alexandur Johansen burturstaddur mikukvøldið, og Erland B. Danielsen var skaddur. John Petersen setti seg sjálvan millum teir fyrstu ellivu ímóti B68. Hann skifti seg sjálvan út, og so er spurningurin, um hann fer at seta seg sjálvan á liðið ímóti B36, sum hann hevur vunnið so nógvar sigrar við.

Hjá B36 er Ingi Højsted framvegis skaddur. Eftir fulla úrtøku í tveimum teimum fyrstu umførunum hevur B36 tríggjar ferðir á rað verið partur av javnleikum. Allar fimm ferðirnar hevur tað verið í Gundadali, og tað verður tað eisini hesa ferð. Í fyrsta umfari legði Skála rygg til 8-1 tap í Gundadali ímóti HB.

**Formula-deildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 13 | 2 | 11 | 11 |
| 2 | EB/S | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 13 | 5 | 8 | 11 |
| 3 | NSÍ | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 5 | 3 | 10 |
| 4 | B36 | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 8 | 3 | 5 | 9 |
| 5 | ÍF | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 9 | -3 | 7 |
| 6 | Víkingur | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 7 | 7 | 0 | 6 |
| 7 | B71 | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 8 | KÍ | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 6 | 11 | -5 | 4 |
| 9 | B68 | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 4 |
| 10 | Skála | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 4 | 14 | -10 | 3 |

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 20 | 0 | 20 | 12 |
| 2 | VB/S | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 15 | 4 | 11 | 9 |
| 3 | AB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 18 | 5 | 13 | 6 |
| 4 | 07 Vestur | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 10 | 9 | 1 | 6 |
| 5 | HB | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 6 | Víkingur | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 4 | 10 | -6 | 4 |
| 7 | KÍ | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 4 | 15 | -11 | 3 |
| 8 | EB/S | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 2 | 17 | -15 | 3 |
| 9 | B68 | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 2 | 8 | -6 | 0 |
| 10 | NSÍ | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 0 |

**Dómarabókin**

| Feløg | | GK | RK | Stig |
|---|---|---|---|---|
| ÍF | | 19 | 3 | 28 |
| B71 | | 12 | 2 | 18 |
| KÍ | | 9 | 1 | 12 |
| Víkingur | | 11 | 0 | 11 |
| B36 | | 10 | 0 | 10 |
| B68 | | 10 | 0 | 10 |
| NSÍ | | 10 | 0 | 10 |
| Skála | | 10 | 0 | 10 |
| EB/S | | 5 | 1 | 8 |
| HB | | 6 | 0 | 6 |
| **Spælarar** | | | | |
| Símin Hansen | B71 | 1 | 2 | 7 |
| Alexander Jovevic | ÍF | 0 | 2 | 6 |
| Balazs Sinko | ÍF | 1 | 1 | 4 |
| Rodrigo | KÍ | 1 | 1 | 4 |
| Vali Miela | Skála | 4 | 0 | 4 |
| Egil á Bø | EB/S | 0 | 1 | 3 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 3 | 0 | 3 |
| Frank Poulsen | ÍF | 3 | 0 | 3 |
| Høgni Madsen | ÍF | 3 | 0 | 3 |
| Andy Olsen | NSÍ | 3 | 0 | 3 |
| Hans Jørgen Djurhuus | Víkingur | 3 | 0 | 3 |
| Niclas Niclasen | Víkingur | 3 | 0 | 3 |

Í yvirlitinum telur gult kort 1 stig. Reytt kort telur 3 stig

**Máltindarnir**

| Formula-deildin | | |
|---|---|---|
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 5 |
| Andrew av Fløtum | HB | 4 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 3 |
| Christian Høgni Jacobsen | HB | 3 |
| Óli Hansen | NSÍ | 3 |
| Obele Okeke Onyebuchi | Skála | 3 |
| Karoly Potemkin | B36 | 2 |
| Jann Ingi Petersen | B68 | 2 |
| Høgni Midjord | B71 | 2 |
| Mortan úr Hørg | HB | 2 |
| Bartal Eliasen | ÍF | 2 |
| Ove Nysted | KÍ | 2 |
| Símun Joensen | KÍ | 2 |
| Jónhard Fredriksberg | NSÍ | 2 |
| **1. deild** | | |
| Johan Eivind R. Mouritsen | TB | 8 |
| Allan Mørkøre | AB | 5 |
| Tróndur Sigurðsson | AB | 5 |
| Olivur Abrahamsen | TB | 5 |
| Birgir Jørgensen | VB/S | 4 |
| Dan Djurhuus | VB/S | 3 |
| Finnur Justinussen | Víkingur | 3 |

## FAKTA um Formula-deildina

**HB-B36 0-0**
**Dómari:** Jens Petur Brattalíð
**HB:** Tróndur Vatnhamar – Mortan úr Hørg, Fróði Benjaminsen, Hans á Lag, Poul Thomas Dam – Ólavur S. í Ólavsstovu, Kári Nielsen, Milan Kuljic (Rógvi Poulsen, 65.)– Jákup á Borg, Andrew av Fløtum (Hendrik Rubeksen, 74.), Christian Høgni Jacobsen
**Gult kort:** Hendrik Rubeksen
**B36:** Meinhardt Joensen – Magnus Olsen, Herbert í Lon Jacobsen, Dmitrij Jankovic, Alex José dos Santos – Odmar Færø (Róaldur Jacobsen, 57.), Klæmint Matras, Tamás Nagy – Hanus Thorleifsson, Karoly Potemkin (Johan Ellingsgaard, 77.), Bergur Midjord (Svenn F. Jacobsen, 89.)
**Gult kort:** Tamás Nagy, Klæmint Matras, Alex José dos Santos

**KÍ-B71 2-1 (2-1)**
0-1: Tummas Pauli Olsen 5.
1-1: Rodrigo Silva 13.
2-1: Ovi Nysted 40.
**Dómari:** Petur Reinert
**KÍ:** Jákup Mikkelsen - Harley Bertholdsen, Ove Nysted (Eli Simonsen, 60.), Milic Curic, Símun Joensen - Jan Andreasen, Kristian á Lakjuni, Kristoffur Jacobsen - John Hammer (Álvur F. Christiansen, 82.), Rodrigo Silva (Steffan Kalsø, 90.), Heðin á Lakjuni
Gult kort: Rodrigo Silva, Eli Simonsen
**B71:** Símun Rógvi Hansen - Johannes Jensen, Fabio Vieira, Allan Tungá, Mikkjal Hentze (Jón Koytu Petersen, 88.) - Gudmund Nielsen (Høgni Midjord, 30.), Flavio Lucio Silva de Santana, Wellington Soares, Símin Hansen - Clayton Soares - Tummas Pauli Olsen (René Clementsen, 80.)
**Gult kort:** Mikkjal Hentze, Símin Hansen

**Skála-B68 0-1 (0-1)**
**0-1:** sjálvmál, 18.
**Dómari:** Lars Müller
**Skála:** Predrag Markovic – Bárður B. Danielsen, Vali Miela, Arnhold Berg, Bárður R. Joensen – Poul N. Poulsen, Pauli G. Hansen, Sjúrður Djurhuus (Atli Kristiansen, 61.), Pætur Dam Jacobsen – John Petersen (Alin Balutoiu, 62)., Okeke Obele Onyebuci
Gult kort: Bárður B. Danielsen
**B68:** Vlada Filipovic – Niklas Joensen, Jóhan Dávur Højgaard, Arnbjørn Danielsen, Øssur Hansen – Kristian Anthon Andreasen (Niklas Poulsen, 80.), Jann Ingi Petersen, Ndende Adama Gueye, Babara Diedhiou – Ameth Keita (Andre Olsen, 35.), Jóan Símun Edmundsson (Súni Fríði Barbá, 70.)
**Gult kort:** Niklas Joensen

**NSÍ-ÍF 3-2 (0-1)**
0-1: Nenad Saric 45.
1-1: Óli Hansen br 67.
2-1: Óli Hansen br 85.
2-2: Bartal Eliasen 88.
3-2: Óli Hansen 90.
**Dómari:** Rúni Gaardbo
**NSÍ:** Tórður Thomsen – Aco Pandurovic, Óli Hansen, Johan Troest Davidsen, Pól Jóhannus Justinussen (Einar Hansen, 65.) – Milan Pejci (Sjúrður Jacobsen, 65.), Nenad Stankovic, Bogi Løkin - Andy Olsen, Jónhard Frederiksberg (Øssur Dalbúð, 38.), Hjalgrím Elttør
Gult kort: Óli Hansen, Andy Olsen, Pól Jóhannus Justinussen
**ÍF:** András Gangó – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Knút Vesturtún, Fritleif í Lambanum – Alexander Jovevic, Frank Poulsen, Høgni Madsen, Nenad Saric – Sasa Jovanovic (Atli Petersen, 85.), Balazs Sinko
**Gult kort:** Alexander Jovevic, Bartal Eliasen
**Reytt kort:** Alexander Jovevic (2 gul) og Balazs Sinko (beinleiðis reytt) báðir í 80.

**EB/Streymur – Víkingur 3-1 (2-1)**
1-0: Høgni Zachariassen 9.
2-0: Arnbjørn Hansen 28.
2-1: Sjálvmál 45.
3-1: Hans Pauli Samuelsen 66.
**Dómari:** Ransin Djurhuus
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Bárður Olsen, Egil á Bø (13.: Marcel Balog (75.: Fróði Clementsen), Marni Djurhuus, Leif Niclassen – Levi Hansen, Høgni Zachariassen (88.: Dánjal Davidsen) – Hanus Eliasen, Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen – Arnbjørn Hansen
**Gult Kort:** Eingin
**Víkingur:** Geza Turi – Hans Jørgen Djurhuus, Atli Gregersen, Niclas Niclassen, Hanus Jacobsen – Símin Louis Jacobsen (82.: Kaj Ennigarð), Sølvi Vatnhamar, Sam Jacobsen, Magnus Skoralíð (69.: Sverri Jacobsen) – Zoltan Bukszegi – Andreas Lava Olsen
**Gult kort:** Sølvi Vatnhamar